**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI SÍLAGØTU,**
**MATR. NR. 803f, TÓRSHAVN**
**SB_Tórshavn_Silagøta_2020_6_2021**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, partur av matr. nr. 803f, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa íbúðarbygging á økinum, samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til bústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 11. desember 2014, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk. 2. Útstykkingin hevur felags tún, felags parkeringspláss og skúrar.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggjast skulu í mesta lagi 14 íbúðir.

Stk. 2. Ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkering skal gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Avsetast skal hóskandi øki til súkkluparkering.

## §6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 21/05674 |
| Ætlanarskriv: | 3/5 - 2021 |
| Góðkent: | 4/5 - 2021 |
| Váttað: | Árni á Hædd |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 1 | | | | |
| **Mát** | 1:2000 | | | | |
| **Dagur** | 03.05.2021 | **Journal** | 20/01446 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 2 | | | | |
| **Mát** | 1:500 | | | | |
| **Dagur** | 03.05.2021 | **Journal** | 20/01446 | **Tekna** | RVH |